GJALDSTOVAN

3. apríl 2025

**Spurningar frá veitara til útboð av Rammusáttmála á kopipappír**

Kunnu tit koma við onkrum dømi um hvat  vørumerki  hevur stórt álit, og hví hevur tað stórt álit?

Svar: Vit hava ikki slík dømir. Tað verður upp til dómsnevndina at gera av.

Hvussu tryggja tit tykkum at allir landsins stovnar keypa kopipappír frá vinnandi útbjóðarinum?

Svar: Keyp Landsins hevur innlit í øll keyp hjá stovnum landsins, og Keyp Landsins er álagt at føra eftirlit við at stovnar landsins fylgja keypsrundskrivinum.

Binda landsins stovnar seg at keypa eina ávísa nøgd av kopipappír  árliga?

Svar: Stovnarnir binda seg ikki at keypa eina ávísa nøgd, og vit vita ikki hvussu nógv kopipappír stovnar landsins hava tørv á í framtíðini. Men rammusáttmálin bindur stovnar landsins, at tá ið teir hava tørv á kopipappír, so skal tað keypast eftir rammusáttmálanum.

Er nakað minsta krav uppá nøgd á goymslu í Føroyum?

Svar: Tað er ikki eitt minsta krav hvussu nógv pappír man skal hava á goymslu í Føroyum. Tað er upp til veitaran at avgerða. Veitarin má hava somikið á goymslu at hann kann levera tað stovninum tørva – avgerðandi er at ongin stovnur kemur í tað støðu at hann onki pappír hevur, vegna væntandi levering frá veitaranum.

Hallur Thomsen
deildarleiðari

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO